# Avdúkingin av Tróndi í Gøtu



*Steingrímur Ranghamar*



*Hanna Jensen*

**Vit hava spurt nøkur gøtufólk, hvat tey halda um standmyndina av Tróndi í Gøtu, og hvussu stemningurin hevur verið í Gøtu uppundir avdúkingina.**

TRÓNDADAGAR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

### Steingrímur Ranghamar, 76 ár.

Steingrímur Ranghamar hevur búð í Gøtu alt sítt lív, og býr í dag á sambýlinum í Gøtu. Hann heldur at tað var uppá tíðina at standmyndin nú kom upp at standa.

- Eg eri glaður fyri at standmyndin endiliga er komin upp at standa. Vit hava bíðað sera leingi eftir hesi løtu, og eg haldi at tú kanst læra nógv av henni, og hon minnir okkum á tíðir, ið eru farnar.

Hóast gøtufólk hava okkurt, Tróndi í Gøtu til minnis, millum annað orðtøkini á skúlanum við Gøtugjógv, har tað stendur “Sjái Guð hluta min”, so heldur Steingrímur Ranghamar at tað er í tøkum tíma, at Tróndur í Gøtu veruliga verður heiðraður.

- Hann var í nógva mátar ein skilamaður. Hann var sera snildur og hann dugdi væl at snúgva sær. Eg haldi at tað hevur nógv at siga fyri Gøtu, at vit endiliga hava fingið hesa standmyndina. Fólkini hava verið spent, men ymiskt er hvussu nógv tosað hevur verið um tað. Summi hava havt hug at spotta, og tey hava sum heild tosað lítið um tað. Hini, sum hava bíðað spent, hava tosað nógv um tað. Men sum heild hava fólk verið spent uppá tað, og tey flestu munnu vera glað fyri tað nú, sigur Steingrímur Ranghamar.

### Hanna Jensen, 35 ár.

Hanna Jensen er lærari á Studentaskúlanum á Kambsdali, og býr í Gøtu. Hon heldur at hetta er ein hóskandi háttur at heiðra Tróndi í Gøtu. Hon heldur at standmyndin er sera áhugaverd. Spurd um hon hevði væntað at standmyndin varð øðrvísi, svarar Hanna Jensen, at hon gjørdist ikki so kløkk.

- Standmyndin minnir um onnur verk, sum Hans Pauli Olsen hevur gjørt. Hatta er hansara stílur, og eg haldi at hatta er ein øðrvísi og áhugaverd standmynd. Eg haldi at tað riggar væl, at hann stendur á einum føroyakorti, og at hann er plaseraður á Eysturoynni og Gøtu. Eg eri fegin um at henda standmyndin nú at enda er komin upp, og eg haldi at tað er rætt at vit heiðra tær legendir, ið vit eiga. Í Gøtu hava fólk leingi tosað um hesa standmyndina, og fólk hava sum heild verið rættiliga spent uppá hana, sigur Hanna Jensen.

Seinastu tvey árini er rættiliga ferð komin á hetta projektið, og vikuna uppundir avdúkingina hevur so at siga alt snúð seg um Trónd í Gøtu. Í barnagarðinum hava børnini havt temaviku um Trónd í Gøtu, og tey hava lært ymiskt um hann.

- Tey hava lært at skriva sínar egnu forbókstavir við rúnum, og tey hava fingið búnar til hetta tiltakið, sum tey so eisini gingu skrúðgongu í. Tey ungu, ið hava arbeitt hjá kommununi, hava verið ófør at hjálpa til og gera økið rundan um standmyndina klárt, og her hevur so at siga alt snúð seg um standmyndina. Hon kemur kanska eisini at geva nakað av sær til kommunua og økið, tí hugsast kann at hetta verður ein standmynd, ið verður eitt ferðavinnumál, sum nógv ferðafólk ætla at vitja, sigur Hanna Jensen at enda.

### Katrin Foldbo, 20 ár og Lis Justinussen, 21 ár.

Katrin Foldbo og Lis Justinussen búgva báðar í Gøtu, og tær siga við ein munn, at standmyndin er spesiell á ein jaligan máta, og at Tróndadagar er eitt gott og áhugavert tiltak.

- Vit halda at hetta er ein góður máti at heiðra Tróndi í Gøtu uppá, og at hetta er ein góð ímynd av honum. Her hevur verið ein serligur stemningur seinastu tíðina, men vit hava ikki tosað so øgiliga nógv um tað. Tá vit so sóu standmyndina, vóru vit skeptiskar at byrja við, men vit halda at hon er vøkur hóast alt. Tað er eisini stuttligt við Tróndadøgum, tað er eitt fínt tiltak, og vit vænta at hetta verður ein heilt góð og spennandi vika. Og so endar vikan eisini við G!mini, so tað er stuttligt at búgva í Gøtu hesa tíðina, leggja tær báðar dent á.



*Katrin Foldbo og Lis Justinussen*

## Meira frá Gøtuhaldinum í vikuni

Sosialurin var hjástæddur, tá standmynd av Trónda í Gøtu varð avdúkað leygardagin. Vit fara eisini í komandi bløðum at gera nógv burtur úr hesum aldarinnar hátíðarhaldi. Fyri Sosialin vórðu Jan Müller og Rógvi Nybo á staðnum.



## Til mostur á føðingardegnum 11. juli

*Lag: Lítla Elsa.....*
Góða mostir tú í dag ert 19 ár frá 100,
og tú vita skalt, tað eru nógv, sum teg beundra,
tí so høgan aldur einans sterkar kempur náa,
vit øll vóna eisini tann møguleikan fáa.

Fyri fáum árum síðan fyri tær vit stúrdu,
maðurin við líggjanum lá eftir tær og lúrdi,
men á honum vanst tú og til lívið vendi aftur,
glað øll vóru fyri tað – tú okkar kæri skattur.

Tá eg lítil var, eitt Paradís var Dalagøta,
har var alt so spennandi – ein óroynd dreymafløta –
bæði dukkuhús og vognur, Anders bløð í stakkum,
kykmyndir og grammofon, og mjólkin var í pakkum!

Svimjingin í Gundadali bar vist allan prísin,
haðani til bakaran at keypa mangan ísin.
Jú, tað vóru dagar sum eg ongantíð man gloyma,
vit øll somul altíð hava følt hjá tykkum heima.

Heiðaskákinum so mikið nógv helst takka kunnu
fyri blíðskap, vælvild, fløva mangir gestir funnu,
gjøgnum nógvar Ólavsøkur trygdarhavn tit vóru,
og so hvørja ferð til Havnar ørindi vit fóru.

Nú á Strondum búgva tit og hava skil á øllum –
ætt og vinum, húsi, seyði, bøi ella fjøllum,
mostir kennir alt og øll, og Jeffrei skrivar niður,
ordanin so góður er, hann ger, sum hon hann biður.

Tá ið skurðfjall verður gingið, mostir er í hopla
hon tá okkum onnur fær frá dagsins strevi koblað.
Og hon seymar blóðmørsindur, rullupylsur góðar,
einki er ímóti, tá hon kjøtpylsu mær bjóðar.

Hesar tær tær bestu eru, sum í Føroyum finnast,
heldur ikki uttanlands kann nakra har eg minnast,
og tá eg ein sang til tín á hesum degi geri,
mangar tøkkir fyri góðar pylsur eg tær beri!

Deiligt fyrr um summarið at koma inn á Strendur,
arbeiði so púra sikkurt var til allar hendur,
omma gjørdi pannukøkur, Jeffrei slerdi grasið,
vit sum hundar hoyggjaðu og mostir leiddi vasið.

Dagliga vit sóu fram ímóti kvøldi góðum,
tí so farið varð á seiðaberg við børnum fróum.
Klettin bestan funnu vit, og so var út at gjara
spennandi hvør mundi størsta fiskinum av varða!

Góða mostir tú mær givið hevur hesi minni,
og mær dámar enn so væl at sita hjá tær inni,
tú ein fróðarkvinna ert og hugnalig at hitta,
míni børn tey kenna teg sum ommusysti fitta.

Hendan sangin skuldi tú í fjør helst hava fingið
betur seint enn ongantíð – nú árið eitt er gingið.
Tó tú vita skalt, at vit øll ynskja tær av hjarta
lukkan fatti teg og tíni – eina framtíð bjarta!

**- Ingun**